# Føroya Banki skuldi helst verðið friðaður

**– Føroya Banki er í ferð við at verða oyddur og tað kann eg ómøguligt góðtaka, sigur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum**

FISKIDAGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Eg eri ómetaliga eymur um Føroya Banka og eg kann ómøgulig góðtaka gongdina sum er nú, tí hetta er við at oyða Bankan, sigur Henrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum*

– Føroya Banki skuldi helst verðið friðaður fyri øllum fiskiskapi.

Tað heldur Henrik Old, løgtingsmaður.

Sum formaður í vinnunevndini er hann ein hin mest týðandi talsmaðurin hjá samgonguni í fiskivinnumálum.

Og hann stúrir so illa fyri gongdini á Føroya Banka hesi seinastu árini, at hann heldur, at tað einasta rætta hevði verið at friða hann fyri øllum fiskiskapi í eitt ella tvey ár.

– Við tí gongd, sum er nú, er Føroya Banki í fullari ferð við at vera oyddur. Og tað kann eg ómøguligt góðtaka, sigur formaðurin í Vinnunevndini.

Hann vísir á, at verður Føroya Banki røktur við skili, er hann eitt sera stórt íkast til Føroyska samfelagið.

– Tí er tað eisini okkara fremsta skylda at røkja hann væl, leggur hann afturat.

## Ongin stórur toskur at fáa

Men Henrik Old heldur, at hesi seinastu árini er hann misrøktur so illa, at hann er beinleiðis í ferð við at vera oyddur.

– Í fyrra lagi er nógv minni at fáa á Bankanum nú, enn tað hevur verið. Men í øðrum lagi er fiskurin, sum er at fáa, nógv minni, enn hann hevur verið.

– Á avreiðingarseðlum sæst, at fyri tveimum árum síðani, var 75-80% av tí, sum bátarnir fingu, stórur toskur. Í fjør var hetta komið niður á eini 50%. Men í ár er als ongin stórur toskur at fáa. Í eini heilari avreiðing hjá einum báti, sløðist kanska ein ella tveir stórir toskar uppi ímillum, sigur løgtingsmaðurin.

– Er tað nakað, Bankin er tiltikin fyri, er tað stóran tosk!

Tí er hann púra sannførdur um, at tað skulu heilt munagóð tiltøk setast í verk fyri at bjarga Føroya Banka.

Hann er fullgreiður yvir, at tað verður sera trupult at fáa semju um at friða Bankan heilt.

– Men minsta kravið má vera, at fiskidagarnir verða skerdir heilt munandi, samstundis sum gýtingarfriðing verður sett í gildi.

– Tað er betri at fáa nakrar fáar, men góðar dagar á Bankanum, heldur enn at fiska sum nú, har bátarnir hava nógvar, vánaligar dagar.

## Handilskvotur forkoma Bankanum

Formaðurin í Vinnunevndini er sannførdur um, at tað er heimildin at keypa og selja kvotur, sum er við at beina fyri Føroya Banka.

– Upprunaliga var ætlanin, at tey stóru línuskipini einans skuldi hava 30 dagar í part á Bankanum. Men nú hava tey keypt so nógvar dagar inn undir seg, at í dag hevur hvørt av teimum stóru línuskipunum 57-58 dagar í part á Bankanum.

Hesar eyka dagarnar hava tey fingið við at keypa dagar frá øðrum bátum. Men í nógvum førum er talan um at teir hava keypt dagar frá bátum, sum aldrin brúka sínar dagar á Føroya Banka.

– Hevði tað ikki borið til hjá teimum stóru línuskipunum at keypt dagar frá teimum minni bátunum, vóru teir dagarnir í hvussu so er spardir.

Henrik Old sigur, at sostatt er veiðitrýstið økt at kalla 100% og tað ber Føroya Banki rætt og slætt ikki, tí talan er um eitt avmarkað øki, hagar ongin fiskur kemur aðrastaðni frá.

## Væntar semju

Hann hevur eisini varhugan av, at politiska skipanin og umsitingin ikki til fulnar skilja álvaran í at røkja Føroya Banka til lítar.

Hinvegin ivast hann ikki í at tað verður sera trupult at fáa politiska semju um at friða Bankan.

Men hann ivast ikki í at tað ber til at finna semju um at seta munagóð tiltøk í verk fyri at bjarga bankanum.

– Fyri 15 árum síðani varð bankin friðaður fyri trol og hartil varð hann fullkomiliga friðaður í tvey, trý ár og tað gjørdi, at hann kom á føtur aftur.

Henrik Old heldur, at støðan á Bankanum er farin at líkjast henni aftur, sum var fyri 15 árum síðani.

– Tí ivist eg ikki í, at tað eisini verður semja um at seta munandi titøk í verk nú.

Henrik Old ivast ikki í, at politikarar skilja, at tað er tað kann gera tað sama at friða Bankan fyri trol, skal loyvi til húkaveiði afturfyri verða at kalla óavmarkað. Tí væntar hann eisini avgjørt, at vilji er til at seta heilt munagóð tiltøk í verk. Hinvegin heldur hann eisini, at tað má halda uppat, at línuskip skulu kunna keypa sær so nógvar eyka dagar á Bankanum, soleiðis, sum tey hava kunnað gjørt seinastu árini.

– Bara tað, at fiskidaganevndin mælir til, at fiskidagatalið á Føroya Banka verður skert 10%, eigur at siga øllum, at støðan er álvarslig.

Hinvegin heldur Henrik Old, at ein skerjing upp á 10% er verri enn so nóg mikið at skerja fiskiskapin á Føroya Banka við.

# Væntar at fiskidagarnir verða skerdir

**Formaðurin í vinnunevndini hjá løgtinginum væntar, at fiskidagarnir verða skerdir eitt sindur**

FISKIDAGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað er sumt, sum bendir á, at fiskidagarnir verða skerdir eitt sindur komandi ár. Men nakað tal við formaðurin í vinnunevndini ikki seta á*

– Eg vænti, at fiskidagarnir verða skerdir eitt sindur.

Tað sigur Henrik Old, formaður í vinnunevnd løgtingsins

Áðrenn 1. september skal løgtingið áseta fiskidagatalið fyri komandi ár og eitt tað fyrsta, løgtingið fær at gera, nú nýggj tingseta byrjar á Ólavsøku, er at áseta fiskidagarnar.

Tilráðingin er at lækka fiskidagaskipanina munandi serliga fyri tosk.

Men Henrik Old vil ikki seta nakað tal á, hvat hann heldur vera tað rætta, men tað er mangt, sum bendir á ein ávísan niðurskurð.

– Ein trupulleiki er at gera niðurskurðar fyri ávísar bólkar, soleiðis at fiskiskapurin eftir toski kann minka, uttan at raka onnur fiskasløg.

Henrik Old sigur, at tað ber til í ávísan mun, eitt nú við økisfriðingum og við at skerja dagatalið hjá bátum, sum serliga fiska tosk. Men tað væntar hann, at tað verður trupult at finna semju um.

Kortini sigur hann, at ymsar ábendingar eru um, at talan verður um ein ávísan niðurskurð í fiskidøgunum komandi ár.

Hetta er ikki tað sama, sum íslendski fiskifrøðingurin Jón Kristjansson mælir til. hann mælir til at økja fiskidagatalið?

– Eg taki ikki undir við Jón Kristjanssyni í hesum. Hann førir fram, at tá ið stovnurin verður ov stórur til føðina, sum er, ella føðin minkar, skal meiri fiskast fyri at røkja stovnin. Hevði talan verið um eitt vatn, ella ein aðra avbyrgda skipan, hevði eg tikið fult undiur við honumm. Men eg dugi ikki at síggja, at ástøðið, sum hóskar til eitt vatn, eisini er rætt á víðum havi, har fiskurin kann svimja aftaná føðini. Tí ber tað ikki til at fiska so vilt, sum hann mælir til. Tað er ein alt ov stóru vági at taka, sigur Henrik Old.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo, runa@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sp/f Andrias Berg:

## Vegastrekkið handað kommununi



*Fríggjadagin 16. juli varð vegastrekkið millum Landavegin og Velbastaðvegin avhandað til Tórshavnar kommunu. Á myndini eru: f.v. Andrias Berg, Arthur Jakobsen, og Rani Jakobsen, frá Sp/f Andrias Berg, Pól Adrian Poulsen, projektverkfrøðingur hjá Tórshavnar kommunu, og Kjartan Egholm byggifrøðingur hjá Landsbyggifelagnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 16. juli 2004 avhandaði entreprenørvirkið Sp/f Andrias Berg liðugtgjørda vegastrekkið millum Landavegin og Velbastaðvegin í Havn til Tórshavnar kommunu.

5. november 2003 var sáttmáli undirskrivaður millum entreprenørvirkið Sp/f Andrias Berg í Havn og Tórshavnar kommunu um liðugtgerð av vegastrekkinum millum Landavegin og Velbastaðvegin í Havn.

Tilboðið upp á liðugtgerðina var upp á gott 2 milliónir krónur. Landsbyggifelagið stóð fyri projekteringini.

Fyri 60 árum síðani:

## Claus mátti lúta fyri Hitleri

Í dag eru liðin 60 ár síðani Claus Schenk Graf von Stauffenberg royndi at spreingja Hitler í luftina. Hann var millum teir leiðandi í 20. juli samansvørjingini móti Hitler, og syrgdi persólinga fyri bumbuni í drápsroyndini móti honum. Sama dag varð hann saman við øðrum mótstøðufólkum tikin av døgum.





*Claus Schenk Graf von Stauffenberg*

### Dagurin

**Elias.** Dagurin verður hildin til minnis um profetin Elias, sum Kongabøkurnar í Gamla testamenti siga frá. Í Føroyum hevur hann fingið navið Líggjas.

Bíbilskt navn, ið merkir *Jahve er Guð mín.*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Mourentza Hansen**
**Sandavágur**

andaðist á Ellisheiminum í Vágum leygardagin 17. juli, 94 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Sandavágs kirkju týsdagin 20. juli kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Finnbjørn og Eivind**

---

†

Kunngjørt verður, at kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Oluf Dam**
**ættaður úr Sandavági**
**búsitandi í Havn**

andaðist 16. juli í heiminum.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin tann 21. juli kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Marjus, Josefina, Ben Eli og Erling**

---

†

Kunngjørt verður, at okkara kæra systir, mostir og fastir

**Jana Jacobsen**
**Heimaratún**

andaðist á Ellisheiminum sunnudagin 18. juli, 91 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 21. juli kl. 15.00.

*Vegna tey avvarðandi*

**Anna**